# Miðvikan

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



Misti pápan:

# Góði Jesus pápi, ger pápa livandi aftur....

**Vit eru nú komin til seinasta partin í hesi røð um Ernestinu. Í hesum partinum fara vit serliga at lýsa bestamannin Jóan Magnus Høgnesen**

**5. partur**

Tann fremsta keldan til hendan partin er Símun Waag Høgnesen, sonur Jóan Magnus, sum var ein teirra, sum doyði við Ernestinu. Símun var eisini saman við soninum Jóan Magnus, kallaður Manni, við á minningarferðini til Íslands í 2000, sum greitt varð frá í seinasta parti.

Tá ið 50 ár vóru liðin síðan hesa vanlukku, skrivaði Símun eina sera áhugaverda grein í Dimmalætting, um hvussu tað var at sita eftir faðirleysur eftir eini slíkari vanlukku. Símun hevur eisini givið loyvi til, at tikið verður burtur úr hesi grein í samband við hesi greinarøð.




*Dávur í Gerðum var skipari á John Bull undan Ernestinu. Hendan myndin er tikin eina ferð, teir landaðu í Keypmannahavn. Á henni eru tríggir av manningini á Ernestinu. Teir eru:*
*1. Berlin Mikkelsen, Syðrugøtu*
*2. Johan Jacobsen, hjá Antines, Klaksvík*
*3. Dávur í Gerðum, Klaksvík, skipari á Ernestinu*
*4. dani*
*5. Hans J. Frederiksen, Uppsølum, Klaksvík*
*6. Jóan P.Klein, Hattarvík*
*7. Sámal Petersen, Mikladal*
*8. Jóan Magnus Høgnesen, Klaksvík, doyði við Ernestinu*
*9. Poul Joensen, Klaksvík, motorpassarin á Ernestinu.*
*10. Óli Frederik Joensen, Klaksvik. Var skipari á Fossanes lagnutúrin í 1938*

## Máttu avstað aftur

**Símun skrivaði í 1980:**
Mikudagin 26. marts eru 50 ár liðin, síðan Ernestine fór á land á Selvogsnesi. Átta mans sjólótust. Ein fekk skaða undir bjargingini og doyði á veg til bygdina Selvogur. Hóast vanlukkur á Suðurlandinum bæði fyri og eftir hesa sum Kristina í 1920, har 16 mans sjólótust, og Fossanes í 1938, har 19 mans fórust, kravdu fleiri mannalív, so telist Ernestine hendingin millum teirra, sum altíð hevur verið umrødd øðrvísi millum manna enn tær flestu. Uttan iva tí tann dramatiska bjargingin er kend, fortald av teimum, sum komu úr hesi ræðuligu deyðsfellu á ein undursaman hátt.

Fyri hesi bjarging slóðaði tað framúrskarandi bragdið, ið Ziska Jacobsen framdi, tá ið hann svam í land aftaná eina bítandi kalda nátt við kavaroki og brimóðn, har skipið varð liðað sundur og einasta vón um bjarging var at seta lív í vága.

Ein onnur orsøk til, at Ernestine-hendingin hevur eitt framstandandi pláss í fólkaminninum, er helst, at hetta var »fiskikongurin,« ið fórst.

Dimmalætting skrivaði tann 9. apríl 1930 m.a.:

Ernestine var en af den færøske Fiskeflaades største og allerbedste Skibe og i fjor indehaver af Aarets Rekordfangst, da den i alt ved Island og Grønland fiskede for kr. 134.000.

Í eini útvarpssamrøðu segði Erik Lassen, ið var við Ernestinu øll árini 1927-1930, at árið eftir fór hann við sama skipara við nýggjum skipi, Skálanes. Leggjast kann afturat, at av teimum 17, sum bjargaðust, fóru allir uttan ein til skips aftur, hóast fleiri teirra høvdu fingið varandi mein av hendingini. Aðrir møguleikar vóru ikki tá í tíðini at lívbjarga sær.

Fleiri teirra fóru eisini avstað aftur við Skálanes við sama skipara, Dáva í Gerðum. Hetta var mitt í tí stóru búskaparkreppuni, ið lamdi heimshandilin, so tann, ið hevði varðveitt lív og toluliga heilsu, var takksamur at fáa møguleika at lívbjarga sær og sínum.

Eg fari at lata sjálva hendingina liggja. Hon livir í fólkaminni og -munni. Hon er eisini fest á blað í føroysku samtíðarbløðunum og hjá J. Símun Hansen: Havið og Vit.

Sum ein av teimum, ið telist millum teirra, sum mistu undir hesi døpru hending hendan feigdardagin, fari eg at taka fram nøkur minnisbrot frá hesi tíðini. Hon hevur verið so ógvuliga nógv merkt av hesum bráða og beiska umskifti, sum tað at missa pápan og forsyrgjarin er.

## Ringt at missa pápan

Minnir frá barnaárum meitla seg ofta serliga fast. Serliga tá tað hava verið óvanligir tilburðir og um tilveran sum heild víkir frá dagligu tilveru annara.

Ein sovorðin munur ger seg galdandi fyri barnið, ið ongan pápa hevur. Hetta er serliga galdandi, tá ið hugsað verður um, at flestu hús á garðinum tá vóru bygd um somu tíð, og børnini í teimum ymisku húsunum fylgdust í aldri.

Pápin var tann, ið leitað varð til, tá ið okkurt skuldi eydnast og trekar av einum og øðrum slag skuldu orðnast. Met um egna virði sprettir í barnaárunum í stóran mun úr tilknýtinum til tey nærmastu.

Mangan var spurt, hvør ið ein var: »Hvør er pápi tín?« Mangan var klumpurin í hálsinum, tá ið svarast skuldi, tí ein pápi, ið var deyður, var einki at kennast við. Ofta var betur at flýggja enn at falla.

## Fekk innivist hjá Kjølbro

Pápi, Jóan Magnus Høgnesen, varð føddur á Skála 12. september 1898 og vaks upp í Lorvík. Foreldrini vóru Rasmina Rasmussen úr Uppistovu á Skála og Høgni Høgnesen Uppi við Garð í Lorvík. Pápi var elstur av 10 systkjum. Evnaligur var hann eisini.

Pápi fór til Klaksvíkar at konfirmerast, og hann mann hava havt sjálvsálit. Tey kendu ongan har. Pápi gjørdi av at biðja fyrsta mann, hann møtti, um innivist, meðan hann gekk til prest.

Hann kom á land úti í Klaksvík og fór til gongu heim eftir. Fyrsta manni, hann møtti, segði hann ørindi síni. Hann fortaldi, hvør hann var og bað um hús. Jú, tað var gaman í. Maðurin bað pápa fara heim á Biskupstøð og siga við konuna Karin, at tað var í lagi. Maðurin var Jógvan Joensen, seinni kendur sum J.F.Kjølbro.

Um pápi var verandi har beint aftaná konfirmatiónina, ella um hann kom aftur seinni, veit eg ikki. Men eina tíð búði hann í hvussu er

Framhald á síðu 16, 17 og 18